


*Allan mars mánaða arbeiddu tey í tvey skiftivakt á TG Seafood í Hvalba. – Í mars fingu skipini nógvan upsa, men seinasta mánaðin hevur fiskiskapurin verið smáligur, sigur Ólavur Bjarkhamar*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Gongur væl hjá TG Seafood

**– Allan mars mánaða fingu skipini nógvan upsa, og tá arbeiddu vit í tvey skiftivakt, men í apríl hevur fiskiskapurin hjá partrolarunum verið slakur, sigur Ólavur Bjarkhamar, stjóri á TG Seafood, sum er fiskavirkið í Hvalba**

Vilmund Jacobsen

At hvalbingar roynast sum fiskimenn, hevur leingi verið kent. Men hvalbingar duga meiri enn at reka skip. Teir duga eisini at reka fiskaframleiðslu. Bygdin er kend sum trolarabygd, og í nógv ár hevur eisini eydnast hvalbingum – undir ymiskum eigarum – at reka fiskavirkið í bygdini.

### Keypa aðrastaðni

Hesa vikuna hevur eingin landing verið í Hvalba, men TG Seafood hevur keypt fisk frá skipum, sum hava landað aðrastaðni. Virkið hevur soleiðis í dag keypt fisk frá Beinissvørði, sum partrolar saman við Ednu. Skipini hava landað í Vági, og fiskurin er komin norður til Hvalbiar í bili.

Ólavur Bjarkhamar, stjóri á TG Seafood, sigur, at tey hava keypt umleið 70.000 pund av upsa frá Beinissvørði.

– Í endanum av seinastu viku keyptu vit eisini fiskin hjá Steintóri og Niels Paula – og hjá Hamranesi og Breiðanesi, og hesin fiskurin vardi nakað út í hesa vikuna.

Stjórin minnist ikki rættiliga, hvussu nógv Steintór og Niels Pauli høvdu inni, men veiðan hjá Hamranesi og Breiðanesi var umleið 170.000 pund tilsamans.

– Seinasta mánaðin hevur fiskiskapurin eftir upsa verið vánaligur, sigur hann.

### Mars var góður

Ólavur Bjarkhamar sigur, at mars mánaði royndist rættiliga góður hjá skipum, manningum, virki og arbeiðsfólki.

– Hendan mánaðin fingu skipini rættiliga nógvan upsa, og vit keyptu nógvan fisk í Hvalba.

Stjórin sigur, at allan mars mánaða arbeiddi tey í tvey skiftivakt á virkinum, har fyrra vaktin arbeiddi frá klokkan 8-16 – og hin seinna frá klokkan 16 til midnátt.

– Hóast fiskiskapurin eftir upsa hevur verið slakur í seinastuni, hevur tó verið hampiliga støðugt við fiskaarbeiði, og hóast eingin beinleiðis landing hevur verið hesa vikuna, hevur kortini verið samanhangur í fiskaarbeiðnum, sigur Ólavur Bjarkhamar.

Í løtuni eru umleið 70 fólk til arbeiðis hjá TG Seafood í Hvalba.

Higartil í ár hevur virkið keypt umleið 2000 tons av ráfiski, og tað er umleið tað sama sum somu tíð í fjør.

### Ymiskar upsavørur

Stjórin á TG Seafood sigur, at framleiðslan á virkinum er fryst flak, frystar portiónir, fesk fløk og feskar portiónir.

– Vit arbeiða bara upsa og hava lagt okkum eftir at fáa sum best burtur úr, sigur hann.

*vilmund@sosialurin.fo*

## Fara neyvan at keypa makrel

**– Nú fáa vit at síggja, hvussu verður við ráfiskatilgongdini – og hvussu verður við møguligari makrelveiði hjá skipunum, sum landa her hjá okkum, sigur stjórin**

Vilmund Jacobsen

Ólavur Bjarkhamar, stjóri á TG Seafood í Hvalba, væntar ikki, at virkið hjá teimum fer at keypa og virka makrel í summar, um skip, sum eru heimahoyrandi í Hvalba, fara á makrelveiði.

– Tað er ikki bara sum at siga tað at fara undir slíka framleiðslu soleiðis í eini handavend.

Stjórin vísir á, at leiðslan á virkinum hevur ikki tikið nakra støðu í so máta, men hann heldur tað neyvan vera hugsandi, at tey fara at virka makrel á virkinum í hesum umfari.

– Vit hugsa sjálvandi um, hvussu verður við tilgongdini av ráfiski, um fleiri skip fara á makrelveiði, men í løtuni er ov tíðliga at siga nakað um hetta.

Spurdur, um ætlanin er, at TG Seafood kanska fer at lata aftur eitt skifti í summar vegna summarfrí, sigur Ólavur Bjarkhamar, at ætlanin hevur ikki verið at lata virkið aftur.

– Men nú fáa vit sjálvandi at síggja, hvussu verður við ráfiskatilgongdini – og hvussu verður við møguligari makrelveiði hjá skipunum, sum landa her hjá okkum, sigur stjórin.